## Nýggj humlu-øl frá Føroya Bjór

Næsta Sct. Brigid ølin í 120 ára føðingardagshaldinum kemur á marknaðin hósdagin. Hesa ferð er talan um sonevnda IPA-øl, sum verður bryggjað í avmarkaðari nøgd. IPA er ein bjór, ið varð bryggjað í Onglandi seinast í 1800 talinum. Ølin varð serliga útviklað og samansett fyri at halda góðskuna alla ta longu ferðina til India. Fyri at røkka hesum máli, nýttu bryggjaríini nógva humlu, eins og alkohol-innihaldið varð hækkað. Hetta seinna kann tó ikki vera meira enn 5,8% í Føroyum. Sct. Brigid IPA er ein gylt, yvirgerað øl, har átta ymisk sløg av malti og fýra sløg av humlu eru nýtt.

## Størri pápa- og felagskvotur

Uppskot at broyta barsilsskipanina er komið í løgtingið. Tíðarskeiðið, har foreldrini samanlagt hava rætt til útgjald, verður longt úr 26 upp í 33 vikur. Pápakvotan, sum er tvær vikur, verður longd upp í fimm vikur, og fýra vikur verða lagdar aftrat teimum 10, sum foreldrini kunnu býta ímillum sín. Pápakvotan skal ikki verða tikin fyrstu 14 vikurnar eftir barnsburð, men fyrstu 33 vikurnar. Sum treyt fyri útgjaldi verður sett, at tann av foreldrunum sum fær útgjald, er um barnið í útgjaldstíðarskeiðinum. Er ein mamma einsamøll um barnið, fær hon pápakvotuna uppá fimm vikur, og er pápin einsamallur, so hevur hann rætt til tær 14 fyrstu vikurnar, skrivar Javnstøðunevndin á heimasíðu sínari. Samstundis verður hámarksútgjaldið hækkað úr 25.000, upp í 27.000 kr. Endaligu roknskapartølini fyri barsilsskipanina eru ikki tøk fyri 2007, men í 2006 vórðu 70 milliónir kr. goldnar í barsilspengum.

# Kann fáa upp í tíggju ára fongsul

**25-ára gamli maðurin, sum er ákærdur fyri at smugla amfetamin og extacy, kann fáa eina revsing heilt upp til tíggju ár. Maðurin er ákærdur eftir trimum ákærupunktum, harav hann noktar seg sekan í punkti eitt og trý so sum ákæran er orðað, meðan hann heilt noktar seg sekan í punkti tvey**



*Óla Jákup Kristoffersen er verji hjá tí ákærda*
*Tekning Hannis Egholm*

NARKOMÁL
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Ein hálvur íslendingur, hálvur føroyingur situr hesa vikuna framman fyri einum nevningatingi, ákærdur fyri smugling og varðveitslu av amfetamin og extacy í stórum mongdum.

Ákærupunkt eitt sigur, at maðurin í døgunum 9. september til 18. september 2007 hevur havt í varðveitslu 24,35 kilo av amfetamini og 14,92 kilo av extacy í bili sínum.

Í ákærupunkti tvey verður hann ákærdur fyri at hava smuglað út av landinum 23,55 kilo av amfetamini og 13,94 kilo av extacy. Eisini hevur hann umvegis triðja persón móttikið 7.640,92 krónur frá íslendska bakmanninum, umframt at hava útvegað kavaraútgerð at umvæla bátin við, sum tveir íslendingar nýttu til at smugla narkoið til Íslands við.

Í triðja ákærupunkti verður sagt, at hann á keiini í Vestmanna hin 17. september klokkan 22.35 hevur fingið 796 gramm av amfetamini og 982 gramm av extacy.

Umframt at ákæruvaldið, umboðað av Lindu Hesselberg, krevur treytaleysa fongsulsrevsing verður eisini kravt, at maðurin verður útvístur úr Føroyum og frameftir verður noktað innferðarloyvi.

Ákærdi noktaði seg sekan í fyrsta ákærupunkti so sum tað er orðað. Hann segði seg hava havt evnini í bilinum frá 9. september til 16. september, men at hann ikki visti av at tað snúði seg um narko, fyrr enn seint hóskvøldið 13. ella tíðliga fríggjamorgunin 14. september.

Í øðrum ákærupunkti noktaði hann seg sekan, eins og hann noktar seg sekan í punkti trý so sum tað er orðað. Hann játtar at hava nevndu narkotisku nøgdir, men segði seg bert hava tær í varðveitslu, samstundis sum hann mótmælti útvísingini.

### Skerpaðar umstøður

25-ára gamli maðurin, sum hevur íslendska mammu og føroyskan pápa, tosar og skilir føroyskt, men vildi kortini hava tulk at umseta donsku framløguna hjá Lindu Hesselberg.

Upplýst varð, at maðurin hevur gingið á Fiskivinnuskúlanum í Vestmanna, og at hann, tá hann kom til Føroya aftur síðsta vár, ikki boðaði Fólkayvirlitinum frá, og at hann tí er skrásettur við bústaði á Selfossi í Íslandi.

Maðurin er ákærdur eftir fleiri lógarparagraffum, men serliga eftir §191, sum umrøður innflutning, útflutning, keyp, sølu, útlevering, móttøku og framleiðslu av euforiseraðum evnum.

Varðveitsla verður somuleiðis roknað undir somu grein. Smugling verður at meta sum ólógligur flutningur um landamørk, og Føroyar verða at rokna sum eitt landamark.

Linda Hesselberg greiddi frá, at um nøgdirnar fóru upp um eitt ávíst, kundi málið roknast sum skerpandi, og hesar nøgdir eru 50 gramm av amfetamini, 150-200 tablettir av extacy og tíggju kilo av hasji.

Hendan paragraffin kann geva upp til seks ára fongsul, men undir skerpandi umstøðum er fongsulsramman heilt upp til tíggju ár. Tá verður roknað við minst tveimum kiloum av amfetamini, og tá talan í hesum føri er um ávikavist 24 og 14 kilo av amfetamini og extacy, eru tað skerpandi umstøður í ólukkumát.

### Pakkað í fendarar

Linda Hesselberg tosaði nógv um, at persónur er sekur, hóast hann ikki tilvitað hevur hjálpt til í einum brotsverki. Altso framdi ákærdi hesar gerðirnar við vilja, ella kundi hann við sannlíkni meta, at narkotisku evnini vórðu smuglað til Íslands.

Ákærin vísti á, at í narkomálum er einki offur sum so. Heldur ikki narkomanarnir sjálvir, tí teir ynskja sjálvir at keypa evnini. Tí eru narkomál trupul at loysa, tí løgreglan ógvuliga sjáldan fær fráboðanir um narko, og als ikki, tá nøgdirnar gerast so stórar sum í hesum førinum.

Tí verða slík mál ofta loyst við telefonlurting og eygleiðing eins og gjørt varð í hesum førinum.

Eisini nam Linda Hesselberg við møguleikarnar fyri at forvinna nógvan pening við at selja narko. Prísirnir í Føroyum eru ein tví- ella trífalding av prísunum í Danmark.

Annars er hetta ikki nakað nýliga íkomið mál. Kanningin byrjaði longu fyri einum ári síðani í Íslandi. Íslendska løgreglan hevði illgruna um, at bakmaðurin við báti sínum, »Lucky Day« hevur smuglað narkotika longu í 2005. Undir rættarmálinum móti honum greiddi maðurin frá, at ein persónur hevði kontaktað hann í fjør um at standa fyri smugling av narko til Íslands, og hann hevði síðani arbeitt við málinum.

Av tí at málið breiðir seg yvir fleiri lond – Holland, Týskaland, Noreg, Føroyar og Ísland – hevur Europol samskipað kanningina. Men hóast fleiri lond eru íblandað, er ongantíð eydnast at finna út av, hvar evnini upprunaliga stava frá.

Málið byrjar á einari kafe í Hafnafirði, har fýra íslendingar leggja ætlanir um, hvussu smuglingin skal skipast. Har fáa menninir eisini hvør sína fartelefon. Hesar er hald lagt á.

29. august fer bakmaðurin við flogfari úr Reykjavík til Keypmannahavnar og har hittir hann hinar tríggjar. Teir fara við ferjuni til Noregs, har løgreglan missir sambandið til teir fýra. Seinni vísir tað seg, at menninir hava leigað ein bát sum teir sigla til Hanstholm.

Í Keypmannahavn pakkar fjórði maðurin evnini í fendarar, sum teir so flyta til bátin í Hanstholm.

**Lesið meiri í blaðnum í morgin**